# Sirkusið um Vaglið í Havn

**Fýra samgonguskjøl. Lygnir. Undirhondsavtalur. Ryggleysir politikarar. Undirskriftir. Proforma. Tey tvey døgnini eftir býráðsvalið í Havnini, hava verið eitt reint – og til tíðir rættiliga undirhaldandi sirkus, fyri okkum, sum hava tímað at fylgt við. Fylt av myrkari óhumsku, sum vit øll vita finnst í politikki, men sum alt ov sjáldan kemur fram í ljósið. Fyri tykkum, sum ikki fylgdu við, ella mistu tráðin, kemur samandrátturin her**

VALIÐ 04
*Eydna Skaale*
*Eydna@sosialurin.fo*

Úrslitið var nóg illa greitt, tá telvingin um samgongu og borgarstjórasess fór í gongd. Tjóðveldið hevði fingið 4 umboð, Fólkaflokkurin 4, Sambandsflokkurin 3 og Javnaðarflokkurin fekk 2 umboð í komandi býráðnum.

### Avtala nr. 1

**Gjørd 10.11.04 kl. umleið 01.30**

Sambært Heðini Mortensen fer fyrrverandi floksfelagin, Høgni Mikkelsen, aftur um ryggin á floksfeløgunum í Sambandsflokkinum, og ger eina undirhondsavtalu við vinmannin Jan Christiansen frá Fólkaflokkinum um samstarv komandi fýra árini. Tá ið teir báðir hava fingið alt upp á pláss, verður boðið til fundar. Heðin roynir av øllum alvi at vinna Sambandsflokkinum størri ávirkan í komandi býráðnum, men hetta verður alt feiað av borðinum.

Kortini verður um 01.30 tíðina ein skrivlig avtala gjørd ímillum Fólkaflokkin og Sambandsflokkin, um at halda fram við samstarvinum í býráðnum. Nevndarsessirnir verða býttir, og Jan Christiansen úr Fólkaflokkinum sleppur at halda á sum borgarstjóri.

Avtalað verður at koma saman aftur seinnapartin dagin eftir, fyri at fáa tað síðsta uppá pláss, og at viðgera, hvørt Javnaðarflokkurin skal verða boðin við í samgonguna. Høgni Mikkelsen vil vera við, at samráðingarnar fara fram í sátt og semju, og eingin mótmælir nøkrum.

Øll skriva undir. Eisini Heðin Mortensen. Á middegi mikudagin sigur Heðin Mortensen tó, at hann als ikki er nøgdur við avtaluna, men at hann tó helt, at hann skuldi skriva undir alíkavæl. Hann sigur, at hann bert sær avtaluna sum eina fyribils avtalu.

Jan Christiansen leggur seg at sova við teirri sannføring, at sitandi samgonga heldur fram komandi fýra árini. Tað gera allir hinir býráðslimirnir eisini – uttan ein.

### Avtala nr. 2

**Gjørd 10.11.04 kl. umleið 05.00**

Tjóðveldisflokkurin veit fullvæl, at samstarvið ímillum Fólkaflokkin og Sambandsflokkin seinastu árini hevði verið sera gott. Jógvan Arge er noyddur at taka tað hálmstráðið, sum er, fyri at vinna Tjóðveldinum ávirkan aftur. Hálmstráðið eitur Heðin Mortensen, sum seinastu 30 árini hevur verið í býráðsarbeiði, uttan nakrantíð at hava nátt hægstu rók.

Heðin fer tí beinleiðis av fundinum við Fólkaflokkin á fund við Tjóðveldisflokkin og Javnaðarflokkin.

Hann boðar alt fyri eitt formanninum í Sambandsflokkinum frá um seinna fundin, men Kaj Leo Johannesen svevur allarhelst nakað fast mikunáttina, tí hann sigur seg ikki kenna nakað til nakra telefonsamrøðu við Heðin. – »Tað er snøgt sagt burtur úr vón og viti, at eg skal hava kent nakað til handan fundin«, sigur hann.

Tá ið seini náttarfundurin er lokin, er enn eitt samgonguskjal skrivað. Hesaferð við Heðini Mortensen úr Sambandsflokkinum sum borgarstjóra. Tveir formanssessir verða latnir til ávíkavist Høgna Mikkelsen og Beatu L. Samuelsen.

Ein kanón góð avtala, sum er væl betri enn avtalan við Fólkaflokkin. Sambandið stendur nú á odda fyri kommununi, umframt fíggjarnevdini og sosialu nevnd. Heðin hevur gjørt kubbið. Heldur hann...

Fyrsta viðmerkingin frá Kaj Leo Johannesen er eisini, at hann sjálvsagt fegnast um, at Sambandið hevur fingið borgarstjórasessin.

Men í politikki broytist myndin skjótt. 24 tímar seinni er stóri atkvøðuslúkurin hjá Sambandsflokkinum settur út í myrkri. »Brýtur tú skrivligar avtalur, skaðar tú flokkin«, eru greiðu boðini frá Føroya Væl.

Høgni Mikkelsen gongur á odda og rópar harðast. Beata gongur aftaná, og brátt hava tey savnað eitt stórt sambandsfylgi, sum púra samt og í felag rópar »krossfest, krossfest«.

Einasti sambandsmaðurin, sum kemur Heðini til hjálpar er Johan Dahl, sum í sínari tíð sjálvur varð lynchaður av høgu sambandsheykunum í Havn. Í lesarabrævi skrivar Johan Dahl, at Høgni, Kaj Leo og Annfinn gera stóran skaða á flokkin við sínum heksajaktakendu avgerðum. Størri skaða enn Heðin, við sínum tveimum undirskriftum.

Men eingin lurtar.

Heðin, sum sjálvur beint eftir valið segði, at »utak verdens løn«, má enn einaferð sanna hesi orðini.

Við egnum orðum fær hann valið um »at verða hongdur ella skotin«, antin at fara úr flokkinum ella verða blakaður út. Hann kann tó breggja sær av at vera fyrsti maður, sum nakrantíð er tveittur úr Sambandsflokkinum.

Tað er í grundini eisini sera forvitnisligt hví, serliga Høgni Mikkelsen, men eisini restin av Sambandsflokkinum, ikki unnir stóra atkvøðuslúkinum Heðini Mortensen borgarstjórasessin. Hví vil Sambandsflokkurin heldur hava Jan Christiansen frá Fólkaflokkinum á hægstu rók? Segði nakar nakað um onkra undirhondsavtalu? Ella at Høgni Mikkelsen er í skeivum flokki?

### Avtala nr 3

**Gjørd 11.11.04, einaferð ímillum kl 23.00 og 06.00**

Jan Christiansen, sum júst hevur tapt ein týdningarmiklan leik í politiska talvinum, fer sjálvsagt við í kórið, sum syngur um ljóta og ótrúverdiga Heðin Mortensen. Borgarstjórasessurin er gloppin honum av hondum, og Jan setur nú alt inn fyri at vinna hann aftur. Tískil setur hann seg við telefonina at ringja til Javnaðarflokkin.

Og Javnaðarflokkurin heldur seg ikki aftur. Katrin Dahl Jacobsen og Elin Lindenskov fara á fund við Jan, Høgna og Beatu, aftanfyri ryggin á Tjóðveldisflokkinum og Heðini Mortensen, hóast Elin Lindenskov tíðliga mikumorgunin bedýrar, at »Javnaðarflokkurin heldur seg til tað, sum vit binda okkum til«.

Og júst Elin Lindenskov situr nú í rættiliga trongum, reyðum skóm. Skal hon halda fast um skjalið, sum hon longu hevur undirskrivað? Við einum borgarstjóra, sum júst hevur stungið sínar floksfelagar í ryggin, og einsamallur er farin upp í samgonguna, sum Torfinn Smith á sinni gjørdi ímóti henni? Ella skal hon fara upp í part við Jan Christiansen og hansara fólki, sum jú undir ongum umstøðum vildu hava hana við í samgonguna fyri tveimum árum síðani?

Javnaðarkvinnurnar fara á fundin. Tær kunnu jú ikki líta á Heðin Mortensen, tá hann kann finna uppá at skriva undir tvær avtalur! Aðra aftanfyri ryggin á samstarvsflokkinum!

Fundurin endar tó við, at eisini Javnaðarflokkurin skrivar undir enn eina samtarvsavtalu. Aftanfyri ryggin á samstarvsflokkinum, Tjóðveldinum.

Tær eru tó snildari enn so, og vilja ikki risikera at koma í somu støðu sum Heðin Mortensen, og harvið seinni verða blakaðar úr flokkinum fyri mist trúðvirði. Tí boða tær valfelagið sínum frá um fundin við Fólkaflokkin.

Viðmerkt á avtaluna við Fólkaflokkin og Sambandsflokkin verður tí, at Suðurstreymoyar Javnaðarfelag skal góðkenna sáttmálan, áðrenn hann verður galdandi.

Men tað ger felagið ikki.

### Tilboð um avtalu nr 4

**Givið 11.11.04, um dagin**

Hetta sirkusið gerst nú ovboðið fyri Jan Christiansen. Nú sær hann seg noyddan til at offra borgarstjórasessin, fyri at koma í samgonguna. Einasti flokkur, sum nú er eftir at fríggja til, er Tjóðveldisflokkurin. »Jógvan Arge borgarstjóri«, ljóðar, í Jansa oyrum, sum eitt skotsikkurt tilboð. Jan hevur jú eisini verið so umhugsin sjálvur at skaða trúðvirðið Javnaðarfloksins, við at fáa tær at fara handan ryggin á Tjóðveldisflokkinum og skriva undir eina hálvvánaliga avtalu við seg. So hóast Jógvan Arge kann hava álit á Heðini Mortensen, tí hesin ikki hevur brotið nakra avtalu við Tjóðveldisflokkin, so má trúðvirðið hjá Javnaðarflokkinum vera rokið.

Men Jógvan Arge vísir seg tó sum ein støðufastan klett í øllum briminum á Vaglinum. Hann sigur nei takk til tilboðið, so nú eru góð ráð dýr hjá Jan Christiansen, sum treivst so væl sum borgarstjóri.

Ein góður spurningur er sjálvandi, hvussu tað ber til, at Tjóðveldið kann standa við avtaluna, tá trúðvirðið hjá bæði Heðini Mortensen og nú eisini Javnaðarflokkinum, hevur fingið eitt so álvarsamt skot fyri bógvin. Var frægasta loysnin ikki at para seg við Fólkaflokkin, fáa borgarstjórasessin og lata trúðvirðisloysingarnar sita í andstøðu?

-------------

Seinnapartin mikudagin pikkar ein 58 ára gamal havnarmaður uppá dyrnar hjá Javnaðarflokkinum. Hann fekk næstflestar atkvøður til valið, og síðani fekk hann durafjóringin frá flokki sínum. Javnaðarflokkurin letur hurðarnar upp og tekur hann til sín. Heðin Mortensen er nú javnaðarmaður, og hevur harvið vent sær aftur á gamlar slóðir.

### Avtala nr 4

**Gjørd 11.11.04 kl umleið 20.15**

Men Jógvan Arge vísir seg sum tann fyrigevandi faðirin, sum gleðiliga lovar øllum sínum óskikkiligu børnum inn í hitan aftur. Avtalan við Heðin Mortensen, sum eingin av hinum flokksfeløgunum, hvørki fyrrverandi ella núverandi kann hava álit á, og Javnaðarflokkin, sum eisini undirskrivaði tvey skjøl, verður standandi, tí Jógvan Arge sigur, »at tað var nakað heilt annað tá, og at tað er nakað nýtt nú.«

Javnaðarkvinnurnar og nýggi limurin í Javnaðarflokkinum, Heðin Mortensen, skriva enn einaferð undir. Heðin viðmerkir enntá, at »Vit í javnaðarflokkinum, vilja gera alt tað besta fyri býin«.

Harvið var samgonguskjalið, sum verður galdandi fram til 2008, sett í gildi.

Jan Christiansen spældi kortini skeivt, tí um hann bert var farin til Tjóðveldið beinanvegin, høvdu teir, tey næstu fýra árini, sloppið undan at sitið í andstøðu, við einum borgarstjóra, teir ikki hava álit á, og einum samgonguflokki, sum ikki hevur trúðvirði.

Fyribils endaliga samgonguskjalið er undirskrivað.

Jan Christiansen um samgongutelving `96:

# Tú kanst ikki samanbera meg og Heðin

**– Tú skalt minnast, at eg sat í andstøðu fram til 1996, og sjálvandi ynsktu vit at gera alt fyri at enda í samgongu. Tú kanst tí ikki samanbera meg og Heðin, tí snýtti eg ikki nakran flokk, tá eg ikki var í nakrari samgongu, sigur Jan Christiansen**

SAMGONGUSLIT
*Páll Holm Johannesen*

– Maðurin er jú botn óreiðuligur.

Tað neyvan at taka munnin ov fullan at siga, at samstarvið millum borgarstjóran í Tórshavnar kommunu, Jan Christiansen og komandi borgarstjóran, Heðin Mortensen, hevur sæð betri dagar.

Tað skortaði ikki við álopum frá Jan Christiansen á Heðin Mortensen í Degi og viku mikukvøldið. Sitandi borgarstjórin í Tórshavnar kommunu legði komandi borgarstjóran undir at hava stungið Fólkaflokkin í ryggin, tá hann gjørdi eina avtalu við Tjóðveldisflokkin og Javnaðarflokkin, eftir at ein avtala var fingin í lag millum sitandi samgongu.

Heðin Mortensen svaraði Jan aftur, at Jan Christiansen sjálvur hevði gjørt sama nummar í 1996, tá Jan Christiansen og Fólkaflokkurin saman við Tjóðveldisflokkinum tóku Lisbeth L. Petersen á bóli, og skipaðu samgongu uttan Sambandsflokkin, sum var størsti flokkur á býráðsvalinum.

Jan Christiansen heldur ikki tað ber til at samanbera støðuna í 1996 og støðuna í 2004.

– Tú skalt minnast, at eg sat í andstøðu fram til 1996, og sjálvandi ynsktu vit at gera alt fyri at enda í samgongu. Tú kanst tí ikki samanbera meg og Heðin, tí snýtti eg ikki nakran flokk, tá eg ikki var í nakrari samgongu. Hetta veit Heðin Mortensen fullvæl, men kortini nýtir hann hetta ímóti mær, sigur Jan Christiansen til ákærurnar.



# Tjóðveldið fekk meira burtur úr Fólkaflokkinum

**– Krøvini frá Javnaðarflokkinum og Sjálvstýrisflokkinum vóru ov hørð fyri Tjóðveldisflokkin, og tí slitnaðu samráðingarnar, sigur Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri, sum heldur flokkin hava fingið eina betur avtalu við Fólkaflokkin**

KOMMUNUVAL 04
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*Her heilsast afturvaldi borgarstjórin í Klaksvík, Steinbjørn Jacobsen, og nývaldi varaborgarstjórin, Jákup Mikkelsen*

Inntil klokkan 21 hóskvøldið sat Tjóðveldisflokkurin í samráðingum við Sjálvstýrisflokkin og Javnaðarflokkin. Hesar slitnaðu, tí partarnir ikki komu til eina semju.

– Vit høvdu tá havt eini fýra útspæl millum partarnar, men annaðhvørt kundu tey ella vit ikki liva við tí, so har var ikki nógv at gera, sigur Steinbjørn Jacobsen. Hann greiðir frá, at tað byrjaði við, at Javnaðarflokkurin bað um at fáa borgarastjórasessin. Tað vildi Tjóðveldisflokkurin ikki. Talan var tó ikki um eitt ultimatum frá Javnaðarflokkinum, so partarnir fóru hvør til sítt at tosa saman. Soleiðis gekk tað aftur og fram, inntil tað var greitt, at krøvini frá Sjálvstýris- og Javnaðarflokkinum vóru ov høg, og samráðingarnar slitnaðu. Steinbjørn sigur, at hann kundi ikki liva við, at hann fekk borgarstjórasessin, meðan hinir limirnir í flokkinum mistu sínar formanspostar, og tískil kundu Tjóðveldisflokkurin ikki góðtaka seinasta útspælið frá Javnaðarflokkinum, sum millum annað legði upp til, at tey skuldu hava formannin í sosialu og havnanevndini – umframt tveir limir í mentanarnevndini.

– Sjálvstýrisflokkurin og Javnaðarflokkurin vóru ein eind við so at siga somu meiningum, so tað bar ikki til at samráðast við bara annan partin, sigur Steinbjørn, sum er fegin um, at ein semja nú er fingin í lag fyri komandi fýra árini.

### Betri avtala

Tjóðveldisflokkurin fær borgarstjóran, formanssessin í sosialu, byggi og býarog heilsu og umhvørvisnevndini, meðan Fólkaflokkurin fær varaborgarstjóran, formannin í mentanar- teknisku og havnanevndini.

Hetta er ein sáttmáli, sum borgarstjórin í Klaksvík er sera vælnøgdur við. Hann heldur sjálvur, at Tjóðveldisflokkurin hevur fingið eina betri avtalu her enn tey høvdu kunnað fingið við Javnaðarflokkin og Sjálvstýrisflokkin.

Teir báðir flokkarnir hava gjørt eitt skriv, har tað, sum teir eru vorðnir samdir um, í høvuðsheitum stendur. Millum annað verður sagt, at Tjóðveldisflokkurin og Fólkaflokkurin vilja í samgongu komandi fýra árini leggja dent á ein varnan fíggjarpolitikk og vilja fremja í verki:

– Opinleika og gjøgnumskygni

– Ein dyggan bústaðar, umhvørvis og vinnupolitikk – og harafturat føra ein virknan mentanar og sosialpolitikk. Aftaná hetta stendur so eisini, at samgongan hevur sett sær sum mál at loysa barnaansingartørvin.

Samgongan fer skjótt at sessast og leggja eina arbeiðsætlan fyri komandi fýra árini í Klaksvíkar býráð.

# E onki politiskt intiativ

**Tjóðveldisflokkurin vildi bara halda fram júst, sum tað hevur verið. Men vit mettu, at eftirsum at bæði Javnaðar- og Sjálvstýrisflokkurin gingu fram til valið, so kundu vit fáa nakað meira, sigur Eyðgunn Samuelsen í viðmerking til, at Fólkaflokkurin og Tjóðveldisflokkurin nú mynda meirilutan í Klaksvíkar Býráð**

KOMMUNUVAL 04
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

**Klaksvík:**
Eyðgunn Samuelsen úr Javnaðarflokkinum sigur, at samráðingarnar millum sitandi meiriluta í Klaksvíkar býráð slitnaðu, tí at Tjóðveldisflokkurin ikki kom við nøkrum ítøkiligum útspæli.

– Tey vildu bara halda fram, sum tað var. Men vit mettu, at við framgongdini til valið í huga, at so áttu vit at fáa eitt sindur meira. Men Tjóðveldisflokkurin hevði ongi politisk hugskot, greiðir Eyðgunn frá.

Hon heldur fram, at Javnaðarflokkurin fult út góðtók, at Steinbjørn við hansara megnarvali, skuldi halda fram í borgarstjórasessinum. Hinvegin helt Javnaðarflokkurin, at tað var teirra skylda at royna at fáa okkurt meira burtur úr samráðingunum, tí Sjálvstýrið og Javnaðarflokkurin báðir gingu fram.

– Men so má eg eisini siga, at Tjóðveldisflokkurin tyktist øgiliga íðin eftir at slíta samráðingarnar hóskvøldið, sigur Eyðgunn og leggur afturat, at tað gekk øgiliga stutt tíð, so hevði Tjóðveldisflokkurin sett seg í samband við Fólkaflokkin.

### Ikki borgarstjóri

Tað hevur ljóðað í býnum, at Eyðgunn áðrenn sjálvt valið, fekk boðið borgarstjórasessin frá Fólkaflokkinum, um Javnaðarflokkurin vildi í samgongu við tey.

Hesum vísir Eyðgunn ikki fullkomuliga aftur, men hon leggur dent á, at Javnaðarflokkurin ikki vildi samráðast til aðrar síður, meðan samráðingarnar við sitandi meiriluta fóru fram.

– So offisielt havi eg ikki fingið bjóðað nakran borgarstjórasess frá Fólkaflokkinum, tí vit hava als ikki sitið í samráðingum. Vit hava gott nokk tosað saman hesar dagarnar, men ikki samráðst yvirhøvur, sigur Eyðgunn Samuelsen, sum hevur hug at vera nakað ivasom viðvíkjandi avtaluni millum Tjóðveldisflokkin og Fólkaflokkin. Hon heldur, at tað gekk ótrúliga stutt tíð frá tí, at samráðingarnar slitnaðu, til Fólkaflokkurin sat við borðið.

Eyðgunn sigur, at á ein hátt er hon vónbrotin, men so kortini ikki.

– Vit hava roynt seriøst at fáa eina semju í lag. Tað eydnaðist so ikki hesuferð. Men um man vil selja sína sál, so hevði man helst fingið alt, sigur Eyðgunn Samuelsen, sum komandi fýra árini fer at sita í minnilutanum í Klaksvíkar býráð saman við Thorleifi Sigurðsson, Kristiani Eli Zachariasen og Hans Arna Bertholdsen.



*Sambært Eyðgunn Samuelsen metti Javnaðarflokkurin, at tey áttu at fingið meira burturúr hesa komandi setuna við framgongdini hjá flokkinum í huga*